WWW.FOROYA-BJOR.FO



## HØVUÐSSKRIVSTOVAN HJÁ FÖROYA BJÓR Í KLAKSVÍK SØKIR AVLOYSARA

**Arbeiðsøkið**
Kundamóttøka, telefonavgreiðsla, logistik, fakturering umframt alt vanligt fyrifallandi skrivstovuarbeiðið.

**Setunartíð**
Talan er um avloysarastarv frá 30-06-2008 og fram til 15-08-2008.

**Førleikakrøv**
Viðkomandi útbúgving ella royndir og áhuga innan øki. Somuleiðs má umsøkjari hava teldukunnleika.

Umsóknarfreistin er sett til 2. juni 2008.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Símun Gullaksen á telefon 475454 757155 ella simun@foroya-bjor.fo. Umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum , skulu stílast til: P/f Föroya Bjór, Postsmoga 4, FO-710 Klaksvík.

Föroya Bjór
– síðan 1888

## Útibarnagarðurin Víkin í Æðuvík

### søkir eftir 2 námsfrøðingum og 1 sjúkraavloysara

**Til Útibarnagarðin verður søkt eftir:**

- 1 námsfrøðingi 30 tímar um vikuna í eitt farloyvisstarv frá 11. aug. 2008 til 17. juli 2009
- 1 námsfrøðingi 30 tímar um vikuna. Tú kemur at hava ábyrgd av einum barni við serligum tørvi. Starvið verður sett eftir nærri avtalu.
- 1 sjúkraavloysara sum er tøkur tá ið tørvur er á tí.

Um eingin námsfrøðingur søkir verður hjálparfólk sett, tíðaravmarkað, í starvið.

Útibarnagarðurin Víkin heldur til í missiónshúsinum í Æðuvík. Á stovninum eru 22 børn í aldrinum 4-5 ár. Náttúran um okkum gevur góðar møguleikar og avbjóðingar, bæði í bygd, fjøru og haga.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- hevur áhuga í at arbeiða við børnum
- dámar væl at vera úti í náttúruni
- ert kreativ/ur
- hevur hug og árræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur góð evnir at samstarva við foreldur og starvsfólk

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Káru Løkin tlf. 449998 ella 214306. Løn smb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Skrivlig umsókn, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu verða Runavíkar kommunu, postboks 139, 600 Saltangará í hendi í seinasta lagi 02/06-2008 kl. 12.

**Útibarnagarðurin Víkin
Æðuvík**

## Starvsfólk til Barnaverndartænastuna

### Fyri: Sørvágs,- Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur

Við hesum verður søkt eftir starvsfólki til Barnaverndartænastuna fyri Sørvágs-, Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur til setan skjótast gjørligt.

Talan er um farloyvisstarv fulla tíð frá 01.08.08 til 31.01.09 við møguleika fyri leingjan.

Barnaverndartænastan heldur til á kommunuskrivstovuni í Sandavági og nakað av ferðing má roknast í starvinum.

**Arbeiðsøki:**
Arbeiði er fjølbroytt og umfatar, umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði, m.a. heimavitjanir, at ráðgeva børnum og/ella familjum teirra, at samstarva við og seta stuðlar í starv.

Arbeiðið umfatar somuleiðis samskifti og tvørfakligt samstarv við skúlar, dagstovnar/dagrøktir, læknar, heilsurøktarfrøðingar, løgreglu, almennar stovnar o.o.

**Vit vænta av tær:**

- At tú hevur hóskandi útbúgving, t.d. sosialráðgevi.
- At tú hevur arbeiðsroyndir innan málsviðgerð í almennari umsiting og/ella hevur royndir frá barnaverndararbeiði.
- At tú ert fleksibul og hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert ábyrgdarfull/ur, miðvís/ur og sjálvstøðug/ur í arbeiðnum.
- At tú ert nærverandi og hevur umsorgan fyri barnsins tørvi.
- At tú hevur góðan telduførleika
- At tú hevur góðan kunnleika í føroyskum máli.

**Løn:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

**Umsókn:**
Hevur starvið tín áhuga, send so skrivliga umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum til Barnaverndartænastuna, Postrúm 19, 360 Sandavágur.

Umsóknin skal verða Barnaverndartænastuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 09. juni 2008 kl. 12.00.

Nærri upplýsningar um starvið fáast við at venda sær til Jónley Poulsen á telefon 333 960 ella 213 960.

Barnaverndartænastan tilskilar sær rættin til at søkja av nýggjum, um ikki nóg nógvar umsóknir eru til starvið.

**Barnaverndartænastan**

## Ein úr Kaliforniu lýsir Føroyar

**Málningar eftir Sigrid Ewald**

**Opið er: 16. – 21. mai – frá kl. 10.00 – 19.00 hvønn dag**

**Tó 21. mai frá kl. 10.00 – 14.00**

**Smiðjan í Lítluvík**



## *Opel Vectra 2.2 GTS*

***Sera vælútgjørdur Opel Vectra 2.2 GTS frá 2003 til sølu. Hevur m.a. 18" alu-felgur. Koyrt 81.000 km. Prísur: 150.000 kr.***

***Tlf. tel. +45 30 58 80 32 ella +45 26 70 80 32***

Hotel Runavík
Sjómansheimið



Tel. 778877 · info@hotel-runavik.fo · www.hotel-runavik.fo

## NÝTT TEORISKEIÐ

Nýtt teoriskeið byrjar hósdagin 22. mai kl. 17.

**KOYRISKÚLI FØROYA**

Stanley A. Olsen tel. 211099
Niels Petur Olsen tel. 223041
Brekkugøta 8 · 100 Tórshavn